*Lagt til rættis: Lív Højsted Horsdal • Myndir: Jens K. Vang, Lív Højsted Horsdal og Hans Fróði Hansen*

# Tríggjar nýggjar kvinnur

Sosialurin hevur saman við Hans Fróða Hansen, Fashion og Image Consultant, gjørt eina fullkomna broyting av trimum bioanalytikarum, sum starvast á Landssjúkrahúsinum. Tær hava fingið serkøna ráðgeving innan klæðir, litir, hár og annað, sum hóskar teimum best

Til at fremja broytingina hava vit sett eitt toymi av serfrøðingum innan ymisk øki saman. Í toyminum stendur Hans Fróði Hansen á odda, og síðan eru Karin Sólsker, hárfríðkanarkvinna, og Elisabeth Johannesen, make-up artistur.

Damurnar – Laila Rajani Færø, Sólrun Wardum og Tóra Holm Jacobsen – vóru dagsins offur. Tær eru allar í 30'unum og starvast á Landssjúkrahúsinum.



*Hans Fróði Hansen er vorðið eitt kent navn bæði í Føroyum, Íslandi og longri úti í heimi. Hann arbeiðir innan mótaheimin og hevur úr at gera við at ráðgeva innan móta, stíl og vælveru*

## Áðrenn



*Sólrun* *Tóra* *Laila*

### FAKTA

**Navn:** Sólrun Wardum
**Bústaður:** Tórshavn
**Aldur:** 38
**Starv:** Bioanalytikari á Landssjúkrahúsinum
**Hjúnastøða:** Gift
**Børn:** Katrin (11), Bartal (9) og Rakul (3)

### FAKTA

**Navn:** Tóra Holm Jacobsen
**Bústaður:** Tórshavn
**Aldur:** 33
**Starv:** Bioanalytikari á Landssjúkrahúsinum
**Hjúnastøða:** Støk
**Børn:** Tvey

### FAKTA

**Navn:** Laila Rajani Færø
**Bústaður:** Hoyvík
**Aldur:** 31
**Starv:** Bioanalytikari á Landssjúkrahúsinum
**Hjúnastøða:** Gift
**Børn:** tvey (2 og 4 ár)

### Sólrun Wardum

*Hví hevur tú hug at vera við til broytingina?*
– Tað er stuttligt at royna okkurt øðrvísi.
– At lata onkran annan avgera, hvussu eg kann síggja út.

*Hvat hevur tú møguliga hug til at broyta?*
– Eg eri við uppá nógvar broytingar, men serliga havi eg hug at broyta hárið.

*Hvat væntar tú?*
– Vónandi verður hetta ein spennandi og stuttligur dagur. Eg gleði meg at síggja, hvussu eg fari at siggja út, tá dagurin er liðugur. Men serliga eri eg spent at síggja mínar starvsfelagar.

*Ert tú nervøs?*
– Nei – tvørturímóti. Eg gleði meg.

### Tóra Holm Jacobsen

*Hví hevur tú hug at vera við til broytingina?*
– Eg haldi, tað er stuttligt at onkur broytir meg fullkomiliga. Tað er ikki ofta, at ein fær møguleika til tess.
*Hvat hevur tú møguliga hug at broyta?*
– Eg havi serliga hug til at broyta hárið.
*Hvat væntar tú?*
– Eg vænti mær eitt positivt, stuttligt og minniligt upplivilsi. Og so nýtt hár sjálvandi.
*Ert tú nervøs?*
Nei, eg eri als ikki bangin. Eg eri bara sera spent.

### Laila Rajani Færø

*Hví hevur tú hug at vera við til broytingina?*
– Tað er stuttligt at vera við og síggja, hvussu onkur fremmandur ætlar at broyta meg. Tað hjálpir eitt sindur, at vit eru tríggjar.
*Hvat hevur tú møguliga hug at broyta?*
– Eg kundi gott hugsað mær ein meira fjølbroyttan klædnastíl – verði klædd meira fín viðhvørt. Somuleiðis kundi eg væl hugsað mær at fingið nøkur góð ráð.
*Hvat væntar tú?*
– Eg rokni ikki við tí heilt stóru broytingini við hárinum, tí nú havi eg stutt hár. Eg fái helst onkra smarta »havnafrisýru«. Og so skal eg helst í okkurt feminint við spískum skóm.
*Ert tú nervøs?*
– Nei, tað eri eg ikki. Eg havi ongantíð verið bangin fyri at royna eina nýggja frisýru.